# MENTANARNÁTTIN

31. mai 2019

TVØROYRAR KOMMUNA

Vælkomin til Tvøroyrar



**15:00 - 19:00** **POSTA** *Sjógøta 2*

**Barnalund**. Aktivitetur og spæl fyri børn í øllum aldri. Royn bóltkast, spøl, sansavirkni og andlitsmáling. Eisini eru børn og vaksin vælkomin at royna tær ymiskt prýddu myndaboksirnar.*(Myndirnar taka tit sjálvi)*

**15:00 - 20:00** **HOTEL TVØROYRI** *Miðbrekkan 5*

Angeli Kjærbæk Larsen, fríðkanarserfrøðingur, sýnir fram og selur húðrøktarvørur og veitir vegleiðing í at nýta hesi.

**15:00 - 22:00** **TVØROYRAR BYGDA- OG SJÓSAVN** *Doktaragøta 5*

Tvøroyrar Bygda- og Sjósavn **opið hús**.

**15:00 - 19:00** **TVØROYRAR SKJALASAVN OG TV. HAVN** *Kongabrekkan 1*

Tvøroyrar Skjalasavn og Tvøroyrar Havn **opið hús** í Kongabrekkuni 1

**15:00 - 20:00** **ÍTRÓTTARDEPILIN VIÐ STÓRÁ** *Við Stórá*

**ÍSF 80 ár**. Forvitnislig framsýning, ið lýsir søguna hjá ÍSF í orðum og myndum.

**16:00 - 22:00** **BETRI TRYGGING** *Sjógøta 17*

Betri Trygging **opið hús**. Starvsfólkini bjóða **frukt**, og til ber at fáa **mált blóðtrýst** og **blóðsukur**. Ráðgevar verða á staðnum og **vegleiða** um tryggingar.

**16:00 - 20:00** **PAKKHÚS 5** *Havnarlagið 36*

**Framsýning** við lutum og veggjamyndum um søguna hjá T. F. Thomsen. Til ber eisini at síggja upprunaskeytið o.a. um Westward Ho, ið verður 135 ár í ár.

**Fyrilestur** 16:30 — “En klassresa” - **Rókur Tummasarson** hugleiðir um langommuna, Idu Petterson, ið giftist Hans Georg Thomsen. Hon kom einsamøll í land av DFDS damparanum Lauru í 1883 og búleikaðist í góð 30 ár á Tvøroyri. Hvør var svenska kvinnan, ið helst ongantíð tosaði um sín uppruna?

17:15 — Petur Petersen greiðir frá framleiðsluni hjá Okkara og møguleiki er at royna **smakkroyndir** av frálíku bjórunum hjá bryggjarínum á Velbastað.

**16:00 - 20:00** **TOYSTOVULOFTIÐ** *Sjógøta 1*

**Listaframsýning** í hølunum í erva á Toystovuni. Luttakandi: Vígdis Sigmundsdóttir, Brynhild (Bibi) Sigmundsdóttir, Cecilia Vestureið, Martin Øster og Janus Dam Guttesen.

**16:00 - 22:00** **PAKKHÚS 4** *Havnarlagið 34*

**Opið hús** í Pakkhús 4. Til ber at síggja hugnaligu hølini, heilsa upp á tey ungu og fáa sær ein kaffimunn.

**Framførsla** 16:15 — **Ungdómsorkestrið** úr Pakkhús 4 spælir nøkur løg.

**16:00 - 18:00** **SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS** *Sjúkrahúsbrekkan 19*(høvuðsinngongdin)

**Bamsuskaðastova** á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tak bamsuna við á sjúkrahúsið, og fá fryntligu starvsfólkini á Suðuroyar Sjúkrahúsi at kanna hana.

**HANDLARNIR Á TVØROYRI HAVA OPIÐ TIL KL. 22:00**

**16:00 - 22:00**

## PAVLAPHOTO *Tvørávegur 15*

Til ber at taka stuttligar myndir av børnunum ella sær sjálvum.

**16:00 - 18:00**

**Framførsla**

16:00 & 17:00

## BÝRÁÐSSALURIN *Tvørávegur 37*

Miðnámsskúlin í Suðuroynni bjóðar á gátt. Miðnámsquiz, næminga-orkestrið spælir nøkur løg og til ber at síggja film, ið næmingarnir hava gjørt. Heilsið uppá næmingarnir og fáið eitt prát.

**16:30**

## HAVNARLAGIÐ *Millum Gestastovuna og Faroe Ship*

112-tiltak á havnarlagnum. **Tvøroyrar Sløkkilið** bjóðar børnunum at royna skúmbað *(2-7 ár)* og at spula við brandslangunum *(7-12 ár)*. Til ber at royna roykrúmið. Brandbilar, løgreglubilar og ambulansar verða á staðnum, eins og bjargingarbáturin Royndin verður at síggja. Børnini fáa grillaðar pylsur og okkurt drekkandi afturvið.
**Bál logar á molanum** millum Delta Seafood og djúphavnina.

**17:00-19:00**

**Framførsla**

18:30

## TVØROYRAR BÓKASAVN *Í Tvøroyrar Skúla*

Vinnarin av "Summar í Føroyum"-teknikappingini verður funnin. Allar innlætnu tekningarnar verða vístar fram og til ber at heilsa uppá bókavørð-in og fáa eitt prát og ein kaffimunn. Tróndur Enni spælir nøkur løg.

**17:00**

**Fyrilestur**

**Framførsla**

## TARVAFJÓSIÐ *Froðbiarvegur, v. bronsumyndina av Pól F.*

Lions Club Suðuroy bjóðar inn í Tarvafjósið á Hamri. **Jana Ólavsdóttir,** jarðfrøðingur, greiðir frá jarðfrøðini í Suðuroynni. **Live Tónleikur** v. **Janus Trúgvason,** verður áðrenn og eftir fyrilesturin.

- **Bussur** koyrir frá tjaldinum í miðbýnum kl. 16:45 til Tarvafjósið og aftur til miðbýin kl. 18:15.

**17:00  22:00**

## VARÐIN PELAGIC *Havnarlagið 11* (inngongd v. skrivstovubygningin)

- Til ber, hjá børnunum, at royna **súkklubátarnar** í hylinum hjá Varðanum, ókeypis.
- Listaframsýning v. **Hansinu Iversen** í møttøkuhøllini í skrivstovubygningi-num. Føroysk klæði, vovin her á staðnum, verða eisini sýnd fram.
- **Rundvísing** á nýggja, stásiliga virkinum hvønn heila tíma.

**Fyrilestur**

19:00

Fyrilestur Við **Sámal Tróndi F. Johansen** um Føroyar undir "kalda kríg-num". Søguligt afturlit og umrøða av støðuni í dag, nú tað tykist sum um tað aftur er við at "kølna". Fyrilesturin verður í "Skálanum".

**17:00 - 21:00**

**Fyrilestur**

**Framførsla**

## STRANDFARASKIP LANDSINS *Sjógøta 5*

**Opið hús** hjá Strandferðsluni. **Thomas Arabo,** fyrrv. strandferðslustjóri, greiðir frá myndaframsýning kl. **17:10-18:30** og **19:00-20:30**. **Mannskór** av Tvøroyri syngur kl. **18:30-19:00** og **20:30** til **21:00**. Møguleiki er eisini at hyggja í gamlar **loggbøkur,** sum liggja frammi, av ymsum skipum hjá SSL, frá 1950'unum og frameftir.

# HANDLARNIR Á TVØROYRI HAVA OPIÐ TIL KL. 22:00


Sjúkrahúsbrekkan
Suðuroyar Sjúkrahús
Sornhústún
Sjúkrahúsbrekkan
Sornhúsvegur
Stórá
SALT
FK
Kassabilakoyring
Traðarvegur
Sornhúsvegur
P
Spæliplássið
P
MC-Treff
Bank Nordik
Posta Workshop
Grilltjaldið
MENTANAR-TJALDIÐ
Gaards Bakarí
Tangabúðin
Magn
Hjá Hans Olaf
Sjógøta
Tvøráveg
Betri Trygging
Toystovan framsýning
Bónus
Strandferðslan
P
Havnarlagið
Ferja til SALT
Bál


Ovari Vegur
Tvøroyrar Klubbi
Doktaragøta
Tvøroyrar skúli og bókasavn
P
Buffét v. Anitu Farstad
Valarabrekkan
Doktaragøta
Miðtún
P
Hotel Tvøroyri
Pizzaria
Esla
Løgreglustøðin
Tarvafjósið
Café MorMor
Grillvognurin
Glasstovan
Grottan
Tvørávegur
Blákrossbúðin
Føroya Tele
Suð. Apotek
Tv. Bygda- & Sjósavn
Doktaragøta
112 -tiltak
Seglloftið
Listaframsýning
Alment VC
Gestastovan
Pakkhús 5
Gl. Kgl. Handil Pub & Kafé
Pakkhús 4
Súkklubátar
Listaframsýning
Varðin Pelagic
Fyrilestur
Havnarlagið

**17:00 - 22:00**

## BLÁKROSSBÚÐIN *Valarabrekkan 2*

Blákrossbúðin hevur opið hús. Heilsa upp á starvsfólkini, fá ein kaffimunn og eitt gott prát. Okkurt serligt tiltak verður eisini á degnum.

**17:30**

**Upplestur**

## GESTASTOVAN *Havnarlagið 50*

Søgur úr Gestastovuni. **Tvøroyrar Sjó- og Fornminnissavn** skipar fyri upplestri av barnasøgum í Gestastovuni á havnarlagnum.

**18:00**



## TRAÐARVEGUR *v. Sólmiðstøðina á Traðarvegi 24*

Suðuroyarmeistaraheitið í **kassabilakoyring**. Byrjað verður við Sólmiðstøðina á Traðarvegi 24.

**18:00 - 20:00**

## LØGREGLUSTØÐIN *Kirkjubrekkan 11*

Løgreglan hevur **opið hús** í Kirkjubrekkuni 11. Til ber at síggja hølini og heilsa upp á vakthavandi.

**18:00 - 20:00**



## SALT *Drelnes 22*

Opið hús í SALT.Vitjið bygningin og síggið stásiligu umstøðurnar. Bátur siglir frá havnarlagnum á Tvøroyri, til SALT og aftur, hvønn hálva tíma.



Bátatúrur

Fráferðir av Molanum á Havnarlagnum, har bálið er.

**18:00** **18:30** **19:00** **19:30**

(tíðirnar kunnu flyta seg nakað)

**18:00 - 20:00**

## BANK NORDIK *Sjógøta 2*

Bank Nordik hevur **opið hús**. Til ber at fara á **listarrundferð** og fáa greitt frá um listina, ið prýðir veggirnar í bankanum. Talan er um 56 listarverk, ið 26 listafólk hava gjørt. Fyritøkan **FaroeKnit**, v. Randi Hjelm Debes, sýnir fram teirra pløgg, ið fáast kring allan heimin.Okkurt leskiligt verður eisini at fáa.

**18:00 - 21:00**

## SUÐUROYAR APOTEK *Kirkjubrekkan 23*

Suðuroyar Apotek hevur **opið hús**. Til ber at máta **blóðtrýstið**, máta **BMI** og gera **TPI**. Ein TPI-kanning fær greiðu á, um fólk við astma nýta heilivágin rætt. Ráðgeving fæst um royking og nýtslu av sólkremi, og til ber eisini at fáa sær ein kaffimunn og eitt prát við starvsfólkini

**18:00-22:00**

## TELEBÚÐIN *Tvørávegur 46*

Telebúðin hevur **opið hús** á mentanarnáttini frá **kl. 18:00**. Til ber at fáa hjálp til at seta upp **Apple-id** fyri børn. Vanligur kostnaður 150,- men á mentanarnáttini, millum **kl. 18-19,** er tað ókeypis. Til ber, millum kl. **20:30-21:30**, at kanna sítt telefonhald og simkort - ert tú klár/ur til summarferiuna? Í erva er skermur settur upp, so til ber at **spæla Gekk** í telebúðini.

## HANDLARNIR Á TVØROYRI HAVA OPIÐ TIL KL. 22:00

**19:00** **CAFÉ MORMOR** *Undir Heygnum 38*

**Framløga**

**Oddfríður Marni Rasmussen** greiðir frá um stórseljandi bók sína, "Ikki fyrr enn tá". Um hvussu tú ber teg at, tá ið tann, tú elskar og livir saman við, broytir persónsmensku. Til ber at keypa bókina og fáa hana signeraða.

**19:00** **TVØROYRAR SKÚLI** *Kirkjubrekkan 3 (fimleikarhøllin)*



**Framførsla**

STAV - óalmenna **suðuroyarmeistarakappingin í staving**, fyri 7. floksnæmingar, í fimleikarhøllini. **Dansibólkurin hjá Dianu J Hansen** undirheldur í byrjanini.

**20:00 - 22:00** **TVØROYRAR KIRKJA** *Kirkjubrekkan 23*



**Framførsla**

**21:00 - 21:30**

**Aftankvirra** í vøkru Tvøroyrar Kirkju, ið um sama mundið hátíðarheldur 111 ára dagin, síðan hon varð vígd, á vári 1908.
**Tónleikur** og **aftanbøn**.

**20:15** **GLASSTOVAN** *Tvørávegur 25*

**Upplestur**

**Jóannes Nielsen** rithøvundi og yrkjari og konan, Rannvá Holm Mortensen, listarfólk og yrkjari, lesa upp yrkingar í Glasstovuni.

**20:15** **SEGLLOFTIÐ** *Havnarlagið 46*

**Fyrilestur**

Fyrilestur um V.U. Hammershaimb, ið hevði verið 200 ár í 2019. **Jákup Reinert Hansen** hugleiðir um mannin, og **Rakul Skaale Andreasen** tosar um hugburð til suðuroyarmál í mun til havnarmál. **Kári Jespersen** og **Jens Pauli Nolsøe**, frá Tvøroyrar Skjalasavni, tosa um, nær føroyskt fór til at vera nýtt í almennum og vinnuligum høpi.

**Framførsla**

**21:30 uml.**

Eftir fyrilesturin, fram til kl. 24:00, verður harmonikutónleikur at hoyra.

**20:30** **SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS** *Sjúkrahúsbrekkan 19*

Rundvísing "**handan gerandisdagin**", á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Vitjið støð ið fólk vanliga ikki síggja á sjúkrahúsinum. Vit hittast við innkoyringina.

**21:15** **GONGUTÚRUR** *Sjúkrahúsbrekkan, v. innkoyringina til sjúkrahúsið*

**Gongutúrur** í miðbýnum. Byrjað verður við endan av Sjúkrahúsbrekkuni og endað verður í miðbýnum beint áðrenn felagssangin. Chris Jan Michelsen er frásøgumaður.

**22:00** **MIÐBÝURIN** *við tjaldið*

**Felagssangur** í miðbýnum á økinum beint við tjaldið. Erolf og Hentzar skipa fyri.

**23:00** **TVØROYRAR KLUBBI** *Kongabrekkan 13*

**Klubbquiz** í Tvøroyrar Klubba og góður tónleikur afturvið.

## HANDLARNIR Á TVØROYRI HAVA OPIÐ TIL KL. 22:00

# MENTANARTJALDIÐ

**Tjaldið er opið frá 15:00 - 24:00**

**PALLURIN**

| | |
|---|---|
| 17:30 | **Skúlakórið** hjá Sólrún syngur nøkur løg |
| 18:00 | **Tóra Effersøe Mortensen**, blaðstjóri á Kvinnu, setur mentanarnáttina 2019. **Tvøroyrar Hornorkestur** spælir. |
| 18:30 | **Ingi Poulsen og Danny Baldursson**, live. |
| 19:30 | **Uni Debess**, live. |
| 20:00 | **Greta Svabo Bech**, live. |
| 21:00 | **Marius Ziska**, live. |
| 21:45 | **Málningauppboðssøla. TB-flogbóltur skipar fyri.** |
| 22:00 | **Felagssangur**. Erolf Olsen og Hentzar Hammer skipa fyri. |
| 23:00 | **Bluesgarparnir**, live. |

**SØLA Í MENTANARTJALDINUM**

**Café MorMor** er á staðnum og selur okkurt lætt til matna, sodavatn, øl og vín.
Orathai (Ey) Wongwai selur **thailendskan mat.**
**TB-flogbóltur** selur vaflur og kaffi. **Fru. Skipper** selur smúkkur og
**Mariann Mikkjalsdóttir** selur serligu, hondteknaðu kortini hjá sær.

**Brekku-catering** grillar **tjúkksteiksbúffar** og **heilsteikir grís** í grilltjaldinum.
**FSR** selir **dessertir** og okkurt drekkandi.
Grilltjaldið er opið er frá 17:00 - 21:00

## ONNUR MATARTILBOÐ

**Buffét** í hondverkarahúsinum, v. Anitu Farstad 13:00 - 22:00. **Pizzaria** Hotel Tvøroyri er opið 15:00-23:00. **Café MorMor** opin frá 20:00 og úteftir. **Glasstovan** er opin frá kl. 10:00 - 24:00. **Hotel Tvøroyri** bjóðar væl smakkandi búff frá kl. 13:00.

**Fast-food** fæst í **Grillvogninum** og **Magn** í Trongisvági.
Bakstur fæst í bakarínum hjá **Hans Olaf**, **Gaards Bakaríi**, **Magn** og matvøruhandlunum **Esla**, **Bónus** og **FK**.

## CAFÉIR OG SKEINKISTØÐ

**Café Mormor** *Undir Heygnum 38 (20 - ..)*
**Glasstovan** *Tvørávegur 25 (10 - 24)*
**Hotelkjallarin** *Miðbrekkan 5 (11 - 24)*
**Tvøroyrar Klubbi** *Miðbrekkan 13 (23 - 04)*

**Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og møguligum broytingum í skránni.**

# HANDLARNIR Á TVØROYRI HAVA OPIÐ TIL KL. 22:00